## HEILSANIR



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Muss og klemm frá
**Diddu og mammu**



Mangt kann henda undir tunnusláttri. Takk fyri seinast.
**Heilsan starvsfólkið á formula.fo**



**Elskaðu Lív og Vár**
Skjótt gongur tíðin - longu eitt ár. Hjartaliga tillukku við degnum 11. apríl.
**Ynskja mamma og babba**



**Góði fitti Høgni**
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum, sum er í dag. Jesus pápi signi lívsleið tína. Tú ert altíð klárur at hjálpa. Tey allarbestu ynskir frá okkum her norðuri.
**Abbi og omma**



**Góði Andrias**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 11. apríl.
**Heilsan mamma, babba og Høgni**



**Til Lív og Vár**
Góðu systrar. Tillukku við 1 ára føðingardegnum 11. apríl.
**Ynskja Bjarni, Jón, Linda og Malan**



**Góðu Teresa og Jonna**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 28. mars og 11. apríl. Sámal fær eisini eina heilsu.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum. Vit síggjast í kvøld við gleði.
**Sámuel**



Hendan vakra kvinna fyllir 65 ár. Vit gleða okkum til í kvøld. Hjartaliga tillukku.
**Ynskir dóttir tín**

**Hey Gunnvør**
Ja. hvør skuldi trúð tí? 65 ár og sær út sum ein drotning. Tillukku góða. Hvat klokkan er tað nú ballið verður?
**Skyldfólk norðaneftir**





**NJ 40 ár**
So fittur - so hjálpsamur - so r.ó.l.i.g.u.r. - so kulur. Eitt rimmar tikkukku við 40 ára degnum.
**Frá búllafamiljuni á Norðasta Horni**



**Góða Sylvia**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum sunnudagin.
**Heilsan vit á 4. hædd í nr. 9**



**Góði elskaði Teitur**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 14. apríl. Jesus pápi signi framtíð tína. Nú ert tú stórur drongur. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða mamma og vermamma**
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum. Vit gleða okkum til leygardagin.
**Heilsan Magni og Hannebeth**



**Góða stóra systir og stóri beiggi**
Hjartaliga tillukku á degnum. Takk fyri at tit eru so góð við meg.
**Lítli beiggi**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:........................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3535
**Navn**: Sp/f Trend Floor
**Adressa:** Box 27, 620 Runavík

**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 08.04.2003
**Viðtøkudato:** 08.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Hans Olsen, Líðarvegur 10, 640 Rituvík
**Stjórn:** Hans Olsen, Líðarvegur 10, 640 Rituvík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 08.04.2003 - 31.12.2003
**Endamál**: Endamál felagsins er at reka keyp og sølu og aðra vinnu í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 10. apríl 2003*
*Kristin Balle*

HOTEL VÁGAR ★★★ THE AIRPORT HOTEL

Ógloymandi borðhald og
**SPENNANDI ÚTFERÐIR**
*10. mai*

Vit stíla fyri:
· Útferð
· Stórari "fjalla"-buffet við meira enn 30 ymsum rættum
· Dansi
· Vistarhaldi
· Flutningi

***Eitt gott tiltak - bæði fyri náttúrufólk og fólk í veitslulag -***

Legg saman flutning, útferð, "fjalla"-buffet, gisting og dans og tú fært:
eina ógloymandi vikuskiftisútferð
***fyri 695,-***
í dupultkamari
v/ gisting og flutningi úr Havnini

Vel ímillum hesar útferðir:
• Gongutúr niðan á Egg
• Gongutúrur til Gásadals
• Gongutúr til Bøsdalafoss
• Siglitúr um Tindhólm (100,- kr. eyka)
*Allir túrarnir eru við ferðaleiðara*

**Twilight**
undirhalda og spæla til dans

**Útferð, borðhald og dansur**
***325,-***

**Dansur *125,-***

Útferðirnar byrja kl. 13.00
Borðhaldið byrjar uml. kl. 19.00
Dansur er frá kl. 23.00
***Bíleggið í góðari tíð á tel 33 29 55***
***- avmarkað atgongd -***

***Eisini fyriskipa vit útferðir fyri virkir og feløg***
***Ring og hoyr nærri!***

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

team85

# LANDMÁTARI

MUNIN

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Munin er at víðka um og hækka tænastu- og góðskustigið innan uppmáting og avseting.
Í hesum sambandi verður søkt eftir landmátara.
Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá Munin**
Munin átekur sær uppmáting og avseting fyri kundar eftir áheitan. Talan er um uppmáting av kloakk og vatni, avsetingar av vegum, uppmátingar av lendi osfr.
Uppgávurnar fevna eisini um klárgerð og hagreiðing av mátidata. T.d. gerð av tvørskurðum og hæddarkurvum.

Kundarnir eru kommunur, entreprenørar, arkitektar, almennir stovnar, privatir kundar o.l.
Til uppmáting og avseting verða nýtt Leica tól:
- *RTK/GPS 530*
- *TPS1103.* *(Einmansstýrd totalstatión)*

Til hagreiðing av data verður brúkt:
- *ESRI ArcView*
- *ESRI ArcInfo*
- *Hugin*

**Uppgávur hjá landmátaranum**
Uppgávur hjá landmátaranum verða m.a. at taka sær av:
- klárgerð og hagreiðing av mátidata.
- uppmáting við RTK/GPS 530
- uppmáting við TPS1103
- viðlíkahald av kortum

**Førleikakrøv**
Av okkara komandi starvsfelaga ynskja vit, at viðkomandi hevur:
- útbúgving í og/ella royndir við landmáting
- royndir við og kunnleika til GIS og CAD skipanir
- góðan tænastuhugburð
- góðan edv-kunnleika
- góð evni at arbeiða málrættað
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni
- góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.
Samráðast kann um løn og arbeiðstíð.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:
**Munin**
**Dr. Jakobsensgøta 18**
**FO-100 Tórshavn**
og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2003.
Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Boga Jacobsen ella Róa Henriksen á tlf. 35 36 00 ella á e-post: munin@munin.fo.

SISERO 351800



*Sp/f Munin er eitt kt-virki við serkunnleika innan GIS*, skráseting og uppmáting.*
*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni fevnir um ráðgeving innan GIS*, uppmáting og avseting av lutum og skráseting av data hoyrandi til hesar lutir.*
*Fyritøkan varð stovnað í november 1998 og svarar talið á starvsfólkum í dag til 3 fulltíðarstørv.*
**GIS - Geografisk Informatión Skipan - er skipan, ið fevnir um skráseting av geografiskum lutum og data hoyrandi til hesar lutir.*

TÁ KORTIÐ GER MUNIN ...

Sightseeing boat tours · Skúvadal Sp/f

**www.vestmannabjorgini.com**